NÝFLETT LAMB
sett í hásætið í Restaurant Hafnia

STÓR LESKILIG BUFFET
har m.a. besta úrval úr føroyskum lambsrættum er at velja í

Etið so nógv tygum orka av køldum og flógvum rættum og royni okkurt leskiligt omaná -

fyri bert 195,-
børn u/ 12 ár hálvan prís

Fríggjad. 7. nov., leygard. 8. nov. & sunnud. 9. nov. frá kl. 18.00 - 21.30

Verið vælkomin á Hafnia - bíleggið borð á tel 31 32 33

Hotellið í miðbýnum
Tel 31 32 33

HOTEL HAFNIA

team85


# Jólabryggj frá Restorffs




### Tíðindaskriv

Jólabryggið frá Restorffs kemur á gøtuna 6. november. Myndin á etikettuni er av kendum listarmanni. J Kvøld verður á Vertshúsinum hóskvøldið og fríggjadagin verður J dagur á Vertshúsinum.

# Ein dreymur um Italia

**Listakvinnan Emma Heinesen, sum sýnir fram í Lítluvík, droymir um at sleppa til Italia at mála**

FRAMSÝNING
*Edvard Joensen*



Emma Heinesen, listakvinna sýnir í hesum døgum fram oljumálningar í Smiðjuni í Lítluvík. Myndaevnini eru føroysk, men listakvinnan droymir um at sleppa til Italia at mála.

Emma Heinesen sigur, at hon altíð hevur málað, men at tað ikki var fyrr enn fyri tveimum árum síðan, at hon fór at sýna fram.

Um útbúgving sigur hon, at hon ikki hevur gingið á dýrum og fínum skúlum. Hon hevur hugt at øðrum, sum málað hava, og tann stóra fyrimyndin er Ingálvur av Reyni, sigur hon.

Hon málar vanliga tað, hon sær. Neyst og bátar. Fjøll og sjógv. Og so kann okkurt fólk sníkja seg inná eina mynd av og á eisini, sigur hon.

Myndirnar eru oljumálningar, og eingin ivi er um, at yndisevnið er tann føroyski báturin, sigur Emma Heinesen.

Framsýningin í Lítluvík er opin fram til sunnudagin. Gerandisdagar er hon vanliga opin millum 11 og 19. sunnudagin verður opið millum 14 og 20.


VARPIÐ
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá TV • Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ DK 4 • TV 1000 • TV3 dk • Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel Euro Sport • MTV • National Geographic • TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2



Select
Leiðari
til Shell-støðina í Gøtudali!

Søkt verður eftir støðleiðara til Shell-støðina í Gøtudali, at byrja skjótast tilber.

Starvið:
Vit kunnu bjóða eitt sera spennandi starv, sum dagligur leiðari á Shell-støðini. Støðin er ein sonevnd **Select-støð**. Hetta eru sera nýmótans støðir, ið leggja dent á at veita kundunum bestu tænastu og eitt serliga stórt vøruúrval, m.a. nýbakað breyð, pylsur, tips & lotto umframt allar bilvørur, sjálvandi.

Eginleikar:
Vit ímynda okkum at umsøkjarin

- hevur góð leiðsluevni
- er ein góður seljari
- er íðin og ágrýtin
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- er miðvísur og framsøkin
- er fjølbroyttur og smidligur
- hevur ordanssans
- er dugnaligur í samstarvi við viðskiftafólk og starvsfelagar

Løn:
Vit bjóða eina løn við eftirlønarskipan, ið verður ásett í samsvari við útbúgving og royndir.

Umsóknir:
Áhugað kunnu senda umsókn við neyðugum skjølum og merkt "Støðleiðari" til P/F Føroya Shell, Viðarnes, 100 Tórshavn, í seinasta lagi 28. november 2003. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum kunnu setast til Erling í Liða, sølu- og marknaðarleiðara á telefon 347400.

www.shell.fo

Team 85 • 358000



NetStarv

KT - útbúgvingin hjá ALV byrjar 5. januar 2004.

Útbúgvingin tekur 16 mánar og verður á Hotel Runavík.

• Málbólkur
Fysisk avlamin fólk, sum hava eina miðnáms og/ella víðari útbúgving ella aðrar javnlíkar royndir. Avlamin fólk, sum hóast sítt brek hava góð útlit til at røkja eitt arbeið innan eitt nú KT-vinnuna.

• Starvenjing
Útbúgvingin er verklig. Umleið helvtin av tíðuni verður skipað á eini fyritøku.

• Endamál
Málrætta útbúgving til óstuðla arbeiði á ávísari fyritøku, t.d. "udvikler", "designer" ella "systemkonsulent"

• Innihald
Eftir gjølla gjøgnumgongd skulu luttakarnir gera seg serkønan á ávísum økið, t.d. databasum, design og interaktivitet. Útbúgvingin verður skipa við skiftivís undirvísing og starvsvenjing.

Umsóknarfreistin er 17. november 2003.

Áhugaði kunnu venda sær á
tlf.: 35 00 70 ella 21 11 35.

Tlf.: 35 00 70
www.alv.fo




# Koloristur í Focus

**Fríggjadagin letur framsýning við klaksvíkinginum upp, og tað eru teir sterku litirnir, ið sermerkja hesa framsýningina**

LIST
*Stefan í Skorini*



*Fríggjadagin letur framsýning við Olivuri við Neyst upp í Galerie Focus í Havn. Sterku litirnir sermerkja listaverkini hjá listamálaranum úr Klaksvík*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Nýggjastu verkini hjá Olivuri við Neyst eru í hesum døgum at síggja í Galerie Focus í Grím Kambansgøtu í Havn. Allir málningarnir eru málaðir í hesum árinum.

Ikki óvæntað fyri Olivur við Neyst eru tað teir sterku litirnir og litspælið, sum eyðkennir hesa framsýningina.

– Mær hevur altíð dámað væl sterkar litir, og nógv litspæl er í mínum málningum, sigur Olivur við Neyst, hvørs málningar eru sera koloristiskir.

Listamaðurin sigur, at hann er ógvuliga ávirkaður av sínum umhvørvi norðuri í Klaksvík frá barnaárunum, og hetta gevur honum íblástur til fleiri av hansara málningum.

Hetta sæst aftur í hansara málningum, sum lýsa útróður, fiskivinnu, bátar, fjøll og náttúruna sum heild, so hansara uppruni er ógvuliga eyðsýndur og hann fjalir seg ikki á nakran hátt.

### Sýnt fram í Finnlandi

Olivur sigur seg vera fegnan um eitt gallarí sum tað hjá Marionnu Norðoy, tí tað gevur listamonnum møguleika at sýna fram uttan at skula skipa fyri sjálvir. Her er tað eigarin av gallaríinum, sum tekur sær av tí praktiska í framsýningunum.

– At vera listamaður er sum at fiska í sjálvdrátti umborð á sluppunum. Tað kann vera sera óstøðugt, men tað liggur altíð okkurt eftir í lippukassanum, tá árið er at enda komið, sigur Olivur. Hann ger nógvar illustratiónir til bøkur, og tað hjálpir væl til.

Olivur hevur sýnt nógv fram seinastu tíðina. Seinast var hann í Finnlandi og sýndi fram saman við Hansinu Iversen, Hanna Bjartalíð og eini finskari listakvinnu á eini oyggj í Finnlandi.

Harumframt hevur hann verið við á eini føroyskari framsýning á Den Frie í Keypmannahavn.

Í næstum verður Olivur eisini við á framsýningini á Norðuratlantisku Bryggjuni í Keypmannahavn. Tann framsýningin letur upp síðst í hesum mánaðinum.

# Útlendingarnir farnir av Norrönu

**Fiskimannafelagið er nøgt við útfallið av málinum um polska arbeiðsmegi umborð á Norrönu, nú allir útlendingar uttanfyri Norðurlond eru farnir av skipinum**

ÚTLENDSK ARBEIÐSMEGI
*Stefan í Skorini*

– Trupulleikin við polakkunum er úti av verðini fyri okkara viðkomandi, sigur Óli Jacobsen, formaður í Fiskimannafelagnum, í viðmerking til gongdina í málinum um útlendska arbeiðsmegi umborð á Norrönu.

Fiskimannafelagið var ónøgt við, at Smyril Line hevði sagt nøkrum av teimum føroysku starvsfólkunum úr starvi, hóast felagið hevði givið manningini umborð á gomlu Norrönu tilsøgn um at fáa starv aftur á tí nýggju. Hetta lyftið varð sambært Fiskimannafelagnum brotið, tá føroyingarnir vórðu sagdir úr starvi, meðan polakkarnir hildu fram umborð.

Hevur Smyril Line bakkað fyri trýstinum frá Fiskimannafelagnum?

– Hetta skal ikki uppfatast sum trýst frá okkara síðu. Vit hava einki ímóti polakkum, men trupulleikin var, at okkara limir høvdu fimgið tilsøgn um at sleppa at halda fram umborð á nýggju Norrönu, men tá Smyril Line minkaði um talið av starvsfólkum, gekk tað út yvir tey, sum høvdu verið longst umborð, sigur formaðurin í Fiskimannafelagnum.

### Útgingið arbeiðsloyvi

Smyril Line sendi týsdagin eitt tíðindaskriv út til fjølmiðlarnar, har sagt verður frá, at seytjan útlendingar úr londum uttanfyri Norðurlond eru farin av skipinum í Hanstholm leygardagin.

Orsøkin var, at tey ikki høvdu neyðugu arbeiðsloyvini til at halda fram. Sambært Smyril Line gingu arbeiðsloyvini út tann 1. november, og tí fóru tey av skipinum.

Á Fútaskrivstovuni verður váttað, at Smyril Line hevur vent sær til myndugleikarnar fyri at kunna seg um reglurnar, sum eru galdandi fyri útlendska arbeiðsmegi. Hetta hevur so ført til, at Smyril Line hevur sent seytjan útlendingar í land.

### Hildið lyftið

Smyril Line sigur í tíðindaskrivinum, at felagið hevur hildið øll givin lyfti yvirfyri Fiskimannafelagnum.

– Smyril Line gav á fleiri fundum í fjør Fiskimannafelagnum lyfti um, at øll umborð á Norrönu – bæði føroyingar og útlendingar – skuldu fáa í boði at flyta yvir á nýggju Norrönu ar arbeiða. Øll uttan eitt starvsfólk tóku av hesum tilboðnum og vórðu sostatt flutt yvir á nýggja skipið. Tey fingu ein eitt ára starvssáttmála, sum kortini hevði eina uppsagnartíð uppá fjúrtan dagar, og hesa uppsagnartíðina brúkti Smyril Line, tá fólk vóðu søgd úr starvi í síðstu viku, stendur í tíðindaskrivinum. Smyril Line heldur sostatt fast um, at felagið ikki hevur brotið nøkur lyfti.

Óli Hammer, stjóri á Smyril Line, vísir á, at tá manningin skal skerjast, má tað til eina og hvørja tíð vera Smyril Line, sum velur manningina eftir førleikakrøvum til starvið.

Fiskimannafelagið vísir tó á, at hóast Smyril Line formelt hevur hildið síni lyfti, so er hetta ikki hent reelt, tí tann eina dagin verður tilsøgnin hildin, men dagin eftir verða starvsfólkini uppsøgd.

Líkt er tó til at málið er liðugt á hesum sinni, og Fiskimannafelagið ætlar sær ikki at gera meira við málið, men Óli Jacobsen leggur dent á, at felagið fer at fylgja við í málinum.


TELEFONBÓKIN 2004

Seinasta freist at lata broytingar inn er fríggjadagin 7. november 2003

Í mars 2004 verður telefonbókin fyri ár 2004 borin út til allar fastnets-telefonfelagar í Føroyum.

Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt.

Hvítu síður
Fríggjadagin 7. november 2003 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2004 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 650 í telefonbókini 2003,ið skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 79 68.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 2.000,00 kr. (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

Gulu síður
Fríggjadagin 7. november 2003 er seinasta freist, at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**
(A)+(D) Standardlýsing ............ kr. 650,00
(B) Stórt navn ............ kr. 50,00
(C) Innramming ............ kr. 100,00
(E) Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) .. kr. 25,00
(sí dømi á s. 648 í Telefonbókini 2003)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/Rættingarblað til Gulu síður er á síðu 649 í telefonbókini 2003, ið skal sendast til: Teleforlagið, Føroya Tele, att. Martin Brodersen, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 32 11 66.

**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum
Postboks 27 · 110 Tórshavn · tel 30 30 30 · fax 30 30 31
www.nummar.fo · info@nummar.fo
www.gulu.fo · info@gulu.fo